Hestprent og Dimma leggja saman:

# Gamlir pengar og nýggj initiativ



*Hjalgrim Samuelsen nevndarformaður (v.m.) og Jon Hestoy stjóri uppi á nýggju prentmiðstøðini Føroyaprent, sum er nýggja felagið eftir samanlegging av Dimmu og Hestprenti. - Avgerðin er tikin til frama fyri kappingarføri móti útlendskum fyritøkum, sigur Jon Hestoy*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Eftir egið prentvirksemi í 126 ár hevur p/f Dimmalætting lagt saman við yngsta føroyska prentfelagnum Hestprent. Nýggja prentsmiðjan ber heitið Føroyaprent, og Jon Hestoy er stjóri, meðan Hjalgrim Samuelsen er nevndarformaður. Høvuðsorsøkin til fusiónina er sambært stjóranum at betra um kappingarførið á óvarda marknaðinum móti útlendskum fyritøkum**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

P/f Dimmalætting og sp/f Hestprent hava 23. juni stovnað nýggja prentsmiðju, sum fær heitið p/f Føroyaprent. Í hesum nýggja felagnum fer alt virksemið hjá sp/f Hestprent og alt virksemið hjá Dimmalætting innan arkprent í nýggju smiðjuna Føroyaprent, men Føroyaprent hevur tó einki við prenti av tíðindabløðum at gera. Nýggja smiðjan hevur eisini yvirtikið bygningin á Hoyvíksvegi 59 frá p/f Dimmalætting, sum í 126 ár hevur rikið egið prentvirksemi, men sum nú hevur valt at fusionera við yngstu prentsmiðjuna í landinum, 20 ára gamla Hestprent.

Meðan Jon Hestoy er stjóri, verður Hjalgrim Samuelsen nevndarformaður í Føroyaprenti, og nevndarlimirnir í nýggju prentsmiðjuni eru Flemming Samuelsen og Susann H. Hestoy.

## Hørð kapping

Leiðslurnar á Dimmalætting og Hestprenti hava avgjørt at taka hetta stigið fyri at styrkja um kappingarførið. Kappingin á grafiska økinum er hørð bæði í Føroyum og við útlendskar prentsmiðjur, og við hesi samanlegging gerst talan sambært leiðsluni um eina stóra prentsmiðju, ið hevur neyðugu útgerðina og styrkina at kappast. Stovnararnir eiga hvør síni 50% í nýggja felagnum.

– Í prentvinnuni er torført at fáa rentabilitet, og íløgukrøvini eru sera høg. Tí mettu vit, at ein fusión ger okkum sterkari, og talan er um eitt reint »fornuftsektaskap«, greiðir stjórin á nýklaktu prentmiðstøðini Føroyaprent frá, Jon Hestoy.

Sostatt er talið av føroyskum prentsmiðjum farið frá fýra niður í trý, og saman við Føroyaprenti eru tað tey bæði Einars Prent og Estra. Men sambært Jon Hestoy eru størstu kappingarneytarnir uttanfyri landoddarnar.

– Tøknifrøðiligi frambúrðurin ger vinnuna og marknaðin óvardan frá útlendskum virksemi, og eru vit tí í harðari kapping við t.d. danskar prentsmiðjur. Alt kann sendast tvørturum landamørk via telduposti ella pdf fílum, og nú er breiðband eisini vaksandi. So hóast vit eru fremst í Føroyum, er kappingin sera hørð, slær stjórin í Føroyaprenti fast. Hann vísir eisini á, at prísurin ongantíð hevur verið so lágur í Danmark, og hetta er alt við til at økja kappingina.

## Besta smiðjan

Í nítiárunum vórðu stórar íløgur gjørdar í prentsmiðjuna við Smyrilsvegin, so hon í dag er best útgjørda prentsmiðjan í landinum, og serstakliga hava íløgur verið gjørdar í litprenti. Einasta 4-litaða prentmaskinan í fullari støðd stendur á prentsmiðjuni hjá Dimmalætting.

– Meðan grundarlagið undir virkseminum hjá Hestprenti hevur verið bøkur, hava teir á Dimmu verið sterkir at prenta bóklingar og hefti, og kombinatiónin av hesum fer vónandi at eydnast væl, sigur Jon Hestoy.

Í byrjanini var Hestprent eitt satsvirki, men í 1999 varð byrjað at prenta eisini. Í 2002 víðkaði Hestprent so aftur virksemið sítt við bókbindaríi, og er hetta størsta bókbindarí í Føroyum í dag.

## 30 starvsfólk

Gott 30 starvsfólk fara at starvast dagliga á nýggju prentsmiðjuni Føroyaprent, og hetta ger felagið til størstu prentsmiðju í landinum. Við hesi samanlegging verða grafikarar, prentarar og bókbindarar savnaðir á einari prentsmiðju.

Við samanlegging til nýggja felagið meta p/f Dimmalætting og sp/f Hestprent seg hava tikið eitt stórt stig fram ímóti at tryggja Føroyum eina kappingarføra prentsmiðju, og í samband við samanleggingina verður almenn móttøka fríggjadagin 25. juni á prentsmiðjuni á Hoyvíksvegnum 59 kl. 15 til 17.30.




